## Demokratia ynskir Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum tillukku

Demokratia fegnast um nýggja stigið hjá Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum fram á javnstøðuleið. Nevndin í Norðoya Sambandsfelag fer á aðalfundinum 29. mars - sum eisini er fyrsti uppstillingarfundur til komandi løgtingsval - at mæla til at stilla eins nógvar menn og kvinnur upp. Flokksformaðurin, Kaj Leo Johannesen, hevur haraftrat boðað frá, at javnstøða skal vera í flokkinum í seinasta lagi í 2012.

Eysturoyar Tjóðveldisfelag samtykti á aðalfundi fríggjakvøldið 9. mars, at eins nógv av báðum kynum verða stillað upp í Eysturoyar valdømi til komandi løgtingsval. Felagið sigur haraftrat, at tað ætlar at leggja nógv fyri fyri at fremja javnstøðu í politikki.

Við hesum hava Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin víst seg sum tveir modernaðar og framburðssinnaðar flokkar, sum ikki góðtaka status quo, men tora at bróta upp úr nýggjum og skilja fyrimunirnar við at gagnnýta alt menniskjutilfeingið.

Demokratia ynskir flokkunum báðum hjartaliga tillukku og góða eydnu.

Ungt virki í SMS:

# Týdningarmikil partur í vinnupolitikkinum

**18 bólkar av ungum kappast í hesum døgum um at vinna »ungt virki«, og harvið fáa møguleikan at sleppa við í altjóða kapping um ársins unga virki**

UNG VINNA
*Leo Poulsen*
*Leo@sosialurin.fo*




*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, setti árskappingina »Ungt virki« í SMS*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað suðar og sjóðar av ungdómi og virkishuga í SMS í hesum døgum.

Árliga kappingin millum ung handilsskúlalesandi er fyri, og heili 18 bólkar hava stovnað virkir og luttaka í kappingini.

Og nógv stendur upp á spæl. Ikki bara heiðurin og æran av at vinna, men vinnararnir skulu eisini umboða Føroyar í altjóða íverksetara kapping uttanlands.

Fyrsta uppgávan hjá vinnarunum verður í kapping hjá Dansk Industri (DM-kapping) í Keypmannahavn í døgunum 26.-27.apríl, og seinni í einari altjóða kapping, Young Enterprise Europe, í juli/august mánaði. Har verður besta virkið í Europa útnevnt sum »Company of the Year«.

At tey luttakandi lesandi ganga høgt upp í hesa kappingina er eyðsýnt. Nógv er gjørt burtur úr básunum, og flestu luttakarar høvdu navnamerki fest á bringuna, navnamerki úr jarni, ið vóru serliga framleidd til høvið.

Men eisini fyriskipararnir gera nógv burturúr. Tað verða ikki hálað tilvildarlig fólk inn at vera dómarar í kappingini, men topp-professionell fólk. Til dømis er kendi sniðgevin Guðrun Rógvadóttir høvuðsdómari.

### Djús og trench-coat

Fyri at undirstrika, at talan ikki er um spæl og nakrar lætt tilvegafingnar frídagar hjá næmingunum, er tað vorðið tradition fyri, at landsstýrismaðurin í vinnumálum setur árskappingina.

Hann segði millum annað, at summi hava fyri munni, at vinnupolitikkur ikki nýtist nógv annað enn útbúgving, útbúgving og aftur útbúgving, og at alt annað kemur av sær sjálvum. Men so einfalt er tað ikki.

- Týdningarmikil partur í vinnupolitikkinum er, at tað í skúlaverkinum og í samfelagnum sum heild verður virkað fyri einum íverksetara og nýskapanar hugburði. Og eg haldi eisini, at tað hevur eyðkent vinnuskúlarnar, at undirvísingin hevur gingið hond í hond við gerandislívið. Vinnuskúlar eru hornasteinar, tá tað ræður um at fjølbroyta føroyska vinnu, og hevur Handilsskúlin gingið á odda í so máta, segði Bjarni Djurholm í setanarrøðu síni.

Hetta er 10. árið at skipa verður fyri slíkari kapping millum lesandi á handilsskúlunum, og at føroyskir næmingar eru dugnaligir er sjón fyri søgn. Teir hava fleiri ferðir verið kosnir Company of the Year.



*Guðrun Rógvadóttir, frá sniðgevarafyritøkuni Guðrun og Guðrun er høvuðsdómari í kappingini*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Sniðgeva føroyskt trench-coat

Ein annar bólkur, ið roynir seg í kappingini Ungt Virki, er sniðgevaravirki við hábærsliga navninum Kongsdóttir.

Tey hava sniðgivi ein jakka, ella trench-coat, sum tær sjálvar nevna tað.

Sjálvt sniðið er gjørt við útlendskum íblástri, men tilfarið er føroyskt. Og verður áhugi fyri vøruni, fara vit sjálvandi at designa serføroysk snið eisini, siga tær tríggjar í felagnum Kongsdóttir.

Men hóast høvuðsdómarin er kendi sniðgevin Guðrun Rógvadóttir, so er íblásturin komin frá gomlu hondarbeiðslærarinnuni hjá Birnu Nielsen, Maritu Sigurdardóttir.

Fyribils hava tær tríggjar sniðgivið tann eina jakkan, sum verður sýndur fram hjá Sirri, sum eisini hevur framleitt. Jakkin – ella trench-coat'ið - fæst í náttúrligum føroyskum litum eftir bileggjing, myrkamorreytt, ljósamorreytt og koksgrátt.




*Tær tríggjar aftan Kongsdóttir eru frá vinstru: Hildigun Lamhauge, Oda Ingemarsdóttir Højgaard og Birna Nielsen. Millum sín hava tær trench-coat'ið, tær hava sniðgivið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Genturnar aftan Kongsdóttir eru av Skálafjørðinum og ganga á Handilsskúlanum á Kambsdali.

**-leo**

# Sukurfrítt djús

Ein av luttakandi bólkunum í Ungt Virki er virkið Sunsjine. Teir hava valt at framleiða og selja sukurfrítt djús.

Hugskotið var at framleiða djús, men ikki bara vanligt djús. Og tá ung í dag eta ómetaliga nógv sukur, kom hugskotið við sukurfríum djúsi, greiða tey 5 í Sunsjine frá.

Tey siga, at ov nógv sukur, serliga til børn og ung, ger, at tey verða hyperaktiv, og tí ikki fáa konsentrera seg í skúlatímunum og harvið virka órógvandi.

Men eisini onnur enn tey ungu munnu fegnast um júst hetta hugskotið hjá Sunsjine, og tað eru fólk við sukursjúku. Hjá teimum man tað koma sera væl við, at eisini tey óttaleys kunnu »tylla« djús í seg uttan at fáa insulinsjokk og tað sum verri er.



*Fólkini aftan Sunsjine eru frá vinstru: Ólavur Dahl, sølustjóri, Sjúrður Fjallsbak, fíggjarstjóri, Martin Midjord, framleiðslustjóri, Elsa Jespersen, skrivari og Torkil Veyhe, stjóri. Sunsjine selur djúsið SOLO, sum kemur í handlarnar fyrsta dagin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Sunsjine kemur frá 1. FHS í Handilsskúlanum í Havn.

**- leo**